## Toskur vigaði 52 pund

Tann 65 ára gamli norski stuttleikafiskimaðurin Knut Ove Randøy viðgekk aftaná, at tað stóð nógv á, áðrenn hann fekk tann 52 pund tunga toskin inn í bátin. Húkurin var eisini bognaður. Við fjølmiðlarnar sigur hann, at hjartað steðgaði á eina løtu, so spentur var hann. Tað var sunnudagin, at Knut Ove Randøy fekk tann 110 centimetrar langa toskin, meðan hann royndi á einari leið 40 fjórðingar úr landi. Hetta er størsti toskur, sum Knut Ove Randøy hevur fiskað. Tað gamla metið hjá honum var 38 pund.



## Nógv fólk til útgávukonsert

Sunnudagin høvdu Monika Stauss Joensen og Birgitte Schnakenburg útgávukonsert í Leirvíkar Bátasavni. Tiltakið var í sambandi við fløgu við klassiskum perlum, sum júst er komin. Fleiri enn hundrað fólk vóru til útgávukonsertina, og einar 60 fløgur vórðu seldar. - Yndi og dýpi í hesum tónleiki ger, at hann á serstakan hátt nemir við okkara kenslur. Burtur úr slíkum perlum úr fleiri londum og við ymiskari bakgrund, hava vit gjørt eitt perluband, sum vit vóna, at fólk kunnu fáa gleði av, siga tær báðar um nýggju fløguna, Monika Stauss Joensen og Birgitte Schnakenburg, sum spæla á ávikavist violin og klaver.

# Neyðtók og og hótti kvinnu við lívinum



*Ein maður er dømdur at sita í fongsli fyri at hava lagt á eina kvinnu tvær ferðir eina náttina. Fyrru ferð royndi hann at neyðtaka kvinnuna, men tað miseydnaðist. Seinnu ferðina tók hann hvørkratak á kvinnuna og fullførdi neyðtøkuna*

*Modellmynd*

**Ein maður er dømdur fyri eina óvanliga grova neyðtøku, har hann eisini tók kvørkratak á kvinnuni og hótti hana við lívinum fyri at hon ikki skuldi melda**

NEYÐTØKA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ein maður er nú dømdur eina trivaliga fongsulsrevsing fyri at hava verið óvanliga harðligur ímóti eini kvinnu.

Tað endaði við, at hann neyðtók hana og tók hvørkatak á henni

Tvær ferðir eina náttina legði hann á somu kvinnu har hann royndi at neyðtaka hana og var óvanliga harðligur ímóti henni til hon misti vitið.

Fyrru ferðina miseydnaðist neyðtøkan, tí kvinnan setti seg til mótverju til tað eydnaðist henni at sleppa til rýmingar

Men stutt eftir fekk maðurin aftur fatur á somu kvinnu og tá fullførdi hann neyðtøkuna.

Av tí sama varð maðurin bæði ákærdur fyri neyðtøkuroynd og fyri beinleiðis neyðtøku.

Men harumframt varð hann eisini ákærdur fyri harðskap av serliga ráum og grovum slagi

Tað er hann tí í sambandi við neyðtøkuna tók hann kvørkratak á hana og takið var so fast, at hon svímaði.

Álopið á kvinnuna var so harðligt, at hon hevði merki, skurðsl og sár ymsastaðni á kroppinum.

Og sum um at tað ikki var nóg mikið, hótti maðurin eisini kvinnuna til at tiga við hendingini, tá ið hon gjørdi honum greitt, at hon fór at melda hann.

Sambært ákæruritinum hótti hann við at drepa hana, ella okkurt líknandi.

### Minnist einki

Maðurin játtaði seg ikki sekan. Sambært honum fekk hann ikki játtað seg sekan, tí hann mintist so lítið til hendingina.

Eftir at ákæran var lisin upp, varð forboð sett fyri at endurgeva meiri úr rættinum og tað varð partvís eisini viðgjørt fyri afturlætnum hurðum.

Men ákærin gjørdi greitt, at kravið er, at maðurin skal í fongsul.

### 22 mánaðir

Nú er maðurin so sømdur at sita í fongsli í eitt ár og 10 mánaðir.

Sostatt varð hann kendur sekur á ákærunum, sum settar vórðu fram ímóti honum.

Harumframt skal hann gjalda kvinnuni, hann gjørdi seg inn á, 70.000 krónur í endurgjaldi og hann skal eisini rinda sakarmálskostnaðin.

Revsingin liggur innan fyri tær rammur, sum eru vanligar í Føroyum fyri lógarbrot sum hetta.

Men Finn Ougaard, varafúti sigur, at hevði hetta verið í Danmark, hevði revsingin verið eitt ár longri í fongsli, tí har her revsingarnar herdar fyri lógarbrot sum hetta.

Í Føroyum verður eisini arbeitt fyri at herða revsingarnar fyri líknandi lógarbrot og Løgtingið viðgerð í løtuni uppskot um hetta.

## 1000 ára gomul mannabein funnin í Hvalba

**Tað er nú staðfest, at mannabeinini, sum ein smádrongur fann í Hvalba í summar, eru 1000 ára gomul**

Tað var í summar, at ein smádrongur fann nøkur mannabein í bakkanum niðanfyri Bønhúsfløtu í Hvalba.

Síðan eru beinini tíðarfest tað gevur gevur ábending um, at garður hevur verið á Bønhúsfløtu í víkingaøld.

Føroya Fornminnissavn hevur havt hesi bein til neyvari kanningar á Antropologisk Laboratorium á universitetinum í Keypmannahavn. Har varð staðfest, at talan er um bein av vaksnum fólki, men tað ber ikki til at siga um talan var um bein av mannfolki ella av konufólki.

Beinini eru partar av vinstra legg- og skinnabeini og brot av fótróts-beini av sama fólki, skrivar Fornminnissavnið á heimasíðu síni.

Umráðandi var tí at fáa staðfest, hvussu gomul beinini kundu vera. Eitt sýnið av skinnabeininum varð sent til kolevnis-14 tíðarfesting á Institut for fysik og astronomi á universitetinum í Århus.

Tíðarfestingin vísir greitt, at beinið er frá tíðini um ár 1000. Hetta er fyrstu ferð, at ein tíðarfesting er gjørd, sum er tengd at einum av mongum plássum, sum bønhúsnavnið er knýtt at.

Beinini geva ábending um ein fornan grevstur ella kirkjugarð. Helst stóð kirkja ella bønhús í kirkjugarðinum. Um so er, eru fornminnini á Bønhúsfløtu dømi um ein garð við grevstri ella kirkjugarði við kirkju, har búleikast hevur verið um ár 1000 – tvs seint í víkingaøld.



*Beinini,, sum vórðu funnin undir bakkanum í Hvalba í summar, stava frá fólki og tey eru frá víkingaøld*